# HENDURNAR UPP ELLA BUKSURNAR NIÐUR





## # 5 Anfinn Kallsberg:

1. **Kall ella Føroya Tele?**
- Føroya Tele

2. **Jolly ella Coca Cola?**
- Jolly

3. **Rás 2 ella útvarp Føroya?**
- Útvarp Føroya

4. **Quality ella Roses?**
- Roses

5. **Siemens ella Nokia?**
- Nokia

6. **Loysing ella samband?**
- Loysing

7. **Flúgva ella sigla?**
- Flúgva

8. **Føroya Bjór ella Restorff?**
- Føroya Bjór

9. **Fótbóltur ella honbóltur?**
- Fótbóltur

10. **Dimma ella Sosialurin?**
- Sosialurin

11. **Tomat ella agurk?**
- Tomat

12. **Svart ella hvítt?**
- Hvítt

13. **Pizza ella grill?**
- Grill

14. **Fløgu, band ella plátu?**
- Band

15. **Kaffi ella te?**
- Te

16. **Jakka ella frakka?**
- Jakka

17. **Lissur ella karalás?**
- Lissur

18. **Rock ella popp?**
- Popp

19. **Mamma ella babba?**
- Mamma

20. **MacIntosh ella PC?**
- PC

21. **Per ella Pól?**
- Per

22. **Um tú var ein bilur, hvat slag skuldi tú so verið?**
- Vit hava altíð havt Nissan, so tað skuldi eg verið.

23. **Hvør hevði sloppið at koyrt ella hvør hevði als ikki?**
- Konan hevði uttan iva sloppið at koyrt til eina og hvørja tíð, men hvør hevði ikki...tað var verri. Eg havi ongar fíggindar, sum eg hevði noktað tí, so tað er so gott hjá mær. Men um eg skal siga ein, so er tað.....Saddam Hussein.


<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.


## Vit skriva:

Tað er løgið. Tá talan er um, at føroyingar klára seg væl uttanlands, so er onki tos um politikk ella um loysing ella samband. Tjóðskaparkenslan blómar uppá tað allar fagrasta, og øll eru errin av at viðkomandi er føroyingur og av at vera føroyingur sjálvi.

Vit kunnu nevna Toda Jónsson, Eivør Pálsdóttir, Teit Lassen og so framvegis. Tá føroyingar koma á altjóða breddan, so eru vit fegin og errin av teimum. Hetta skal nú heldur ikki misskiljast. Tí tað eiga vit at vera. Onki er galið við tí.

Altjóða pallurin, tað verið seg bæði tá tað kemur til ítrótt, tónleik, list ella, hvat tað nú skal vera, er stórur, men føroyingar hava ikki nógv at umboða seg. Og tá tað so ber til hjá einum úr okkara pinkulingatjóð at gera vart við seg, verður viðkomandi móttikin sum hetja tá fóturin stígur aftur á føroyska jørð. Fjølmiðlarnir eru sum gribbar um deyðseyð, og øll eygu er vend sama veg.

Eitt tað seinasta útspæli frá føroyingi uttanlands var, tá Guðrun Sólja Jacobsen megnaði at vinna tað innleiðandi umfarið í donsku sjónvarpssendingini »Stjerne for en aften«. Eitt megnaravrik eru øll á einum máli um.

Vit sóu tað eisini, tá hon fór kring Danmark og sang. Tey føroysku fløggini vóru at síggja allastaðni. Allir føroyingar í Danmark hava grópað langt niðri á kistubotninum og funnið Merkið framaftur. Tí tá er gott at vera føroyingur.

Unga tvøríagentan skal um ikki so langa tíð í hálvfinaluna í somu kapping. Hvussu henni fer at gangast vita vit sjálvsagt ikki enn, men allir føroyingar eru í hesum føri í sama báti. Tjóðskaparkenslan kemur fram, og tann dagin Guðrun skal vera við í sendingini, er ongin ivi um, at fleiri túsund føroyingar fara at sita klistraðir til sjónvarpsskíggjan og krossa fingrar fyri, at henni gongst væl. Og soleiðis eigur tað eisini at vera.

Tey, sum fara út, og seta Føroyar á heimskortið, eiga at fáa allan møguligan stuðul, sum til er. Hvør minnist ikki tá Hjalgrím bara var millimetrar frá sensatiónini niðri í Týsklandi. Tað munnu vera nógv, sum eru lopin upp úr sofuni í berum spenningi.

Og gongst ikki so væl sum vónað, so er tað nú heldur ongin skomm. Als ikki, heldur tvørturímóti.

Sum sagt, so skal Guðrun aftur í eldin 21. ella 28. mars. Hon hevur valt ein vakran og stillan sang, sum eitur »Hero« hjá Mariah Carey. Og uttan mun til úrslitið, so verður Guðrun ein »hero« tá hon kemur heimaftur til Føroya.

<ph_1>



**Vangamyndin:**  **Guðrun Sólja Jacobsen**

# Totalt feitasta upplivilsi nakrantíð



Tað er svarið <ph_1> fær, tá vit spyrja Guðruna Sólju Jacobsen um, hvussu tað var at standa á palli og vinna Stjerne for en aften. Og hon fegnast samstundis um, at hon hevur fingið nógvar nýggjar og góðar vinir, og at hon fekk møguleika til at syngja saman við Hanne Boel

Guðrun Sólja Jacobsen er eitt navn, sum hvørt mansbarn kennir. Men fyri bara tveimum mánaðum síðani, er tað ikki vist, at tey vóru so mong, sum kennast við navnið. Í øllum førum er tað púra vist, at danir ikki kendu hana tá. Men í dag vita so at siga øll, hvør henda unga, vakra og fryntiliga tvørágentan er.

Hon sang seg inn í hjørtuni á øllum áhoyrarum og hyggjarum hjá DR2 fyri góðum mánaði síðani við sanginum Promise me hjá Beverly Craven. Og hóast hetta er ein avbera vakur sangur, so eru tað fleiri, sum als ikki kendust við sangin, áðrenn Guðrun sang hann. Hon sigur, at hon fekk eina fløgu sum gávu fyri nøkrum árum síðani, og har var sangurin uppi á.

– Je fall fyri honum beinanvegin, og mær dámdi hann bara so væl, sigur Guðrun, sum aftur verður at hoyra annaðhvørt 21. ella 28. mars í hálvfinaluni í Stjerne for en aften við sanginum Hero hjá Mariah Carey.

## Hero

Herfyri gjørdi Guðrun endaliga av, hvønn sang hon fer at syngja í hálvfinaluni í Stjerne for en aften. Og hesuferð verður tað eisini ein stillur sangur við nógvum avbjóðingum til røddina. Sangurin Hero var eitt stórt hitt, tá hann kom út fyrst í níti-árunum. Guðrun hevur valt sang eftir avriki. Tað vil siga, at hon velur ein sang, sum rættiliga kann geva henni ein møguleika til at vísa, hvat hon kann við síni ótrúligu rødd. Og tað fer Hero uttan iva at geva henni.

Guðrun hevur ikki fingið endaliga at vita til hvørja av hálvfinalunum, hon skal verða við í.

– Eg havi bara fingið at vita, at eg skal halda báðar dagarnar fríar, og eg veit ikki, nær eg fái nakað endaliga at vita, sigur hon, tá <ph_1> fær fatur á henni í matarsteðginum í miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Hon er sera spent til hálvfinaluna, og hon er farin í gongd við at venja av álvara nú bert góðar tvær vikur eru eftir til fyrru hálvfinaluna.

– Sangurin spælir allatíðina heima. Umaftur og umaftur og umaftur, sigur Guðrun flennandi og leggur afturat, at hóast sangurin kemur at verða framførdur við hennara egnu tulking, so fer hann ikki at bróta so øgiliga nógv frá stílinum hjá Mariah Carey.






| | |
|---|---|
| **Navn:** | Guðrun Sólja Jacobsen |
| **Føðingardagur:** | 11.07.1982 |
| **Starv:** | Lesandi |
| **Yndisorð:** | Tað gongur nokk |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stór, tá tú vart lítil?** | Djóralækni |